Kall og TeleF endaliga samanlagdar

Føroya Tele hevur nú bert ein kappingarneyta á fastnetøkinum. Leygardagin vórðu Kall og Tele F endaliga samanlagdar. Framtaksgrunnurin er størsti partaeigarin í »nýggju« fyritøkuni, sum eigur 31% av samlaða ílagda kapitalinum áljóðandi 24,5 mió

SAMANLEGGING
Heri á Rógvi

Í 1997 kom lógin um fjarskifti í Føroyum, sum avtók einkarrættin hjá Føroya Tele (tá Telefonverk Føroya Løgtings). 3. oktober 2000 varð TeleF sett á stovn, tá ið føroyska Tele Tænastan og Íslandssími valdu at seta tveir líka stórar partar í hesa nýggju fyritøkuna. Tann 14. desember 2000 varð skipanin hjá TeleF alment tikin í nýtslu. Eitt sindur eftir hetta kom Kall eisini á marknaðin við teirra loysnum á fastnetøkinum. Felagið varð upprunaliga stovna í 1999 og kallaðist tá fyri Alnót, men helt, tá ið virksemi av álvara skuldi fara at byrja, at eitt nýtt navn var hóskandi.

Nýggja nevndin í Kalli: fv. Jan Otto Holm, Kaupthing, Billy Hansen, Tele Tænastan, Óli Hansen, Framtaksgrunnur Føroya, Oskar Magnusson, Íslandssimi, Halvor Snarvold, Tallaton Holding og Bjarni Askham Bjarnason, stjóri fyri Kall.
Mynd: Heri á Rógvi

Leygardagin 24. november vórðu Kall og TeleF so samanlagdar. Síðani í summmar hava fyritøkurnar báðar samrátts um, hvussu ein samenlegging skuldi skipast. Eftir at tað praktiska og løgfrøðiliga nú er komið upp á plass, er einki sum eitur TeleF til longur — í øllum førum ikki innanfyri føroyskt fjarskifti. Tað er nevniliga soleiðis, at Kall var tann av teimum báðum peningaliga sterkari fyritøkan, soleiðis at tað verður Kall navnið, sum verður varðveitt, og partareigararnir í Kalli eiga framvegis størsta partin av »nýggja« Kalli.

Styrkt felag

Á eykaaðalfundinum hjá Kalli 24. november skuldi alt tað praktiska viðvíkjandi samanleggingini fáast upp á pláss. Ein nýggj nevnd varð vald. Í nýggju nevndini sita: Óli Hansen, Jan Otto Holm, Halvor Snarvold, Oskar Magnusson og Billy Hansen. Hesir umboða allir hvør sín av teimum stóru íleggjarunum í Kalli. Óli Hansen er formaður fyri nevndina, og hann umboðar Framtaksgrunn Føroya. Kaupthing, Íslandssimi og Tallaton Holdning eiga 17% av Kalli og Tele Tænastan eigur 13%. Tey írestandi 5 prosentini eiga aðrir smærri føroyskir íleggjarar. Tallaton Holdning er ein svenskur grunnur, sum ger íløgur í ymiskt. Íslandssimi er eitt stórt íslendskt fjarskiftisfelag og Kaupthing er eitt íløgufelag.

Fyriuttan at leggja báðar fyritøkurnar saman í eina fyritøku, so varð eisini partapeningurin hækkaður. Sum nú er, so er samlaði ílagdi kapitalurin í Kalli 24,5 mió kr.

Bjarni Askham Bjarnason sigur, at teir seinastu tíðina hava nýtt nógva tíð og orku til sjálva samanleggina, soleiðis at teir ikki eru komnir so langt ávegis við framtíðar ætlaninum, men teir ætla at koma út á marknaðin við fleiri og nýggjum tænastum. Eisini á GSM-økinum ætla at fara at gera seg galdandi, men teir vilja als ikki seta nakra tíðaravmarking fyri, nær henda verkætlanin skal vera liðug.

Bæði stjórin og formaðurin leggja stóran dent á, at serliga við hesum nýggja ílagda kapitalinum, so hava íleggjararnir víst, at teir trúgva upp á fyritøkuni, og teir fara nú av álvara undir at kappast við Føroya Tele.

Skifta yvir

Sum nú er eigur Kall umleið 10% av føroyska marknaðinum á fastnetøkinum. Teir umleið 700 kundarnir hjá TeleF fáa allir at vita í teirra næstu rokning, at teir eru skiftir yvir til Kall. Tað vera verandi prísirnir hjá Kalli, sum vera galdandi í nýggju fyritøkuni.

Tað er ikki enn greitt, hvussu tað verður við starvsfólkunum hjá TeleF í nýggju fyritøkuni. Uppgávan hjá stjóranum næstu tíðina verður at fáa fyritøkurnar báðar at hanga saman og at finna útav og sjálvandi eisini, hvussu felagið skal mannast í framtíðini.

Billy Hansen, sum var stjóri fyri TeleF, heldur áfram í Kalli, har hann skal arbeiða sum sølustjóri umframt at sita í nevndini.

Nógv rúsevni í Eysturoynni

Løgreglan í Runavík sigur, at heilt fitt av rúsevnum eru í Eysturoynni og um Skálafjørðin. Hon sigur seg tó ikki hava ta neyðugu arbeiðsorkuna at koma hesum til lívs

RÚSEVNI
Stefan í Skorini

– Heilt fitt av rúsevnum eru í umfari á Skálafjørðinum og í Eysturoynni sum heild. Tað verður nógv brúkt her inni eisini, sigur Kurt Rasmussen, ið er løgreglumaður í Eysturoynni.

Hann hevur verið við í narkobólkinum á løgreglustøðini í Havn. Í hesum bólkinum eru tveir mans í løtuni, men Kurt starvast nú inni í Eysturoynni.

Hann heldur, at tað er umráðandi ikki at bagatellisera hassj og onnur av teimum bleytaru rúsevnunum, ið verða flutt inn til Føroyar. Tey eru eisini ein hóttan og skulu takast í størsta álvara, heldur hann.

Løgreglan heldur, at uppáhaldið um, at rúsevnisnýtslan í Eysturoynni er vaksandi, als ikki er tikið úr leysum lofti, og at nakað er um henda trupulleika. Teir flestu íbúgvarnir munnu eisini kenna til hesi viðurskifti.

Ávísir bólkar

Tað er serliga um Skálafjørðin, at rúsevni verða seld og skifta hendur. Fjørðurin er miðdepil fyri oynna, og tí er tað natúrligt hjá seljarum at halda til har.

-Løgreglumaðurin sigur, at tað er ávísir bólkar av ungum, ið nýta rúsevni. Hesir eru kendir av løgregluni, sum tó er ógvuliga lamin, tá tað kemur til at fanga brúkarar av rúsevnum og kanska serliga sølumenninar.

Tað er eisini ógvuliga vanligt, at tað eru heilt blaðung fólk, ið roykja og snodda rúsevni. Og evnini keypa tey frá eldri monnum.

Tað er tað sama mynstrið í Havn sum aðrastaðni kring landið.

Fyri viku síðani fann hassjhundurin hjá tollvaldinum fimm kilo av hassji í einum eykajhóli. Hesir smuglararnir vórðu tiknir, men nógvir aðrir eru slopnir ótarnaðir inn í landið við rúsevnum
Savnsmynd

– Vit hava ikki so góðar umstøður at arbeiða í, so at vit kunnu fáa fatur á bakmonnum og brúkarum. Vit fáa at kalla einki gjørt í okkara vanligu arbeiðstíð, tí tað krevur nakað eyka, sigur løgreglumaðurin.

Í løtuni er hesin trupulleikin ikki fremsta málið hjá løgregluni, men í næstum verður størri arbeiðsorka sett av til júst henda trupulleikan.

Tað gongur soleiðis fyri seg, at teir, ið smugla evnini til landið, skiftast um at taka váðan av hesum. Tí er tað torførari hjá lógarinnar varðmonnum at steðga hesum.

Rúsevnini verða sjálvsagt býtt út, har ungdómar savnast á kvøldi, og ein stórur partur av virkseminum hjá seljarum fer eisini fram í bilum.

Talan er mest um hassj, ið er mest nýtta rúsevnið í Føroyum. Men løgreglan sigur, at onnur rúsevni so sum kokain og amfetamin eisini verða nýtt.

Fyrimunurin við t.d. hassji er, at tað mangan er bíligari at fáa sær ein hassjrús heldur enn at nýta rúsdrekka, ið kann vera ógvuliga dýrt. Eisini slepst undan at fáa hundasjúku, sum mangan fæst eftir at hava nýtt rúsdrekka.

Løgreglan í Runavík sigur, at Eysturoyggin als ikki er aftanfyri miðstaðarøkið, tá talan er um rúsevni. Heilt fitt av rúsevnum eru at finna í økinum, men løgreglan hevur ilt við at fáa bilbukt við hesum trupulleikanum
Savnsmynd

Mettaður marknaður

Løgreglan sigur seg kunna siga við vissu, at marknaðurin er mettaður. Nóg mikið er til, so at øll, ið ynskja sær ein rús, altíð kunnu bera so í bandi, at tey fáa nøkur gramm til keyps. Tað er tí altíð lætt at fáa hendur á.

Rúsevnini verða flutt inn í landið á einfaldan hátt, og tað er kanska ov lætt hjá smuglarum.

Fyri viku síðani funnu tollarar fimm kilo av hassji í einum eykahjóli, ið hekk undir einum bili. Hesuferð vórðu smuglararnir tiknir, men hjá fleiri øðrum smuglarum er tað eydnast at fáa rúsevnini inn við sær.

Løgreglan sigur eisini, at tann einstaki borgarin væl kann gera meira við at hjálpa løgregluni í stríðnum móti rúsevnum.

Hetta kann gerast við at boða løgregluni frá, um tey hava illgruna til onkran, ella um tey varnast okkurt illgrunasamt.

Koyrdi við kenning

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Náttina til sunnudagin varð ein maður tikin og skuldsettur fyri at koyra við kenning.

Tann 22 ára gamli maðurin var einsamallur í bilinum, tá hann var úti fyri einum lítlum ferðsluúhappi á Lützenstrød í Havn.

Løgreglan var á staðum og tók blóðroynd av manninum. Bíðað verður nú eftir úrslitunum av royndunum, sum eru sendar til Danmarkar.

Stormskaðar í Klaksvík

STORMUR
Stefan í Skorini

Leygarnáttina var kolandi stormur um størsta partin av landinum. Í Klaksvík var kanska serliga ringt, tí her vórður nakrir vindskaðar fráboðaðir løgregluni.

Svimjihøllin verður í løtuni umbygd, og á byggiplássinum var ymiskt, ið ikki varð fest ordiliga. Brandstøðin boðaði byggiharranum, ið er byggifelagið Kanjon, frá, og menn frá felagnum fóru á staðið og festu tað, ið festast skuldi.

Nakrir bilar hava eisini fingið skaða av vindinum. Leysir lutir eru foknir við vindinum á bilar, ið stóðu parkeraðir framvið vegnum.

DEMENS *linjan* - *ein hjálp til tín, ið vil vita meira um demens*

Tel 31 31 02 - svarar týsdag kl. 18.00-20.00

Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens.

Tú kanst vera dulnevnd/ur, tá ið tú ringir, og vit hava tagnarskyldu.

Øll kunnu ringja.

Tey, ið svara, eru ráðgevar við drúgvum royndum um demens.

Ring um tú sjálv/ur hevur demens, um tú ert avvarðandi, fakfólk ella av aðrari orsøk bara vilt vita meira um demens. Vit vegleiða um demens.

Ring um tú bara vilt tosa við onkran.

Demenslinjan vegleiðir og upplýsir um:

- *Hvat demens er*
- *Kanningar*
- *Viðgerðarmøguleikar*
- *Hvar tú fært hjálp*
- *Torførar støður í gerandisdegnum*
- *Sorg, skuldarkenslu og aðrar kenslur*
- *Samskifti (kommunikatión)*
- *Bókmentir*

ALZHEIMER *felagið*